# Tá “Polly et Sally” fór á land í Hvalba



»Sally et Polly« var ein brigg



A. GUTTORMUR DJURHUUS

### “Sally et Polly” og “Royndin fríða”

Í “Sosialinum” hin 17 februar í ár hevði eg grein har eg staðfesti at “Sally et Polly” ógjørligt kundi vera sama skip sum “Royndin fríða”, ið summi hava viljað verið við. Onkur “søgufrøðingur” er farin so langt sum at tvíhalda um at “Sally et Polly varð sleipað av Hvalba til Vágs, har hon varð umvæld og umdoypt til “Royndina fríðu”!

### “Sally et Polly” fer á land

Forsøgan til strandingina og sjófrágreiðingin er at finna í omanfyri nevnda “Sosiali”. “Polly et Sally” kom inn á Hvalba hin 20. januar 1803 og varð sett inn á sandin tí at hon lak so illa at menn ikki klaraðu at pumpa, so hon var um at søkka.

### Sýn av vrakinum

Vegna Lauritz Olsen, sorenskrivara, sýnar Ole Evensen, sýslumaður, skipið saman við serkønum hin 22. februar og aftur hin 26. mars, saman við somu serkønu monnum. Sýnisskjalið ljóðar í síni heild soleiðis:

*Lauritz Olsen*
*Kongelig Majestets*
*Sorenskriver paa Færøerne*

*Giør vitterligt at Aar 1803 den 22de Februar var mødt ombord paa Skibet Sally et Polly kommen fra Petersborg hiemmehørende i Dysart i Skotland ført af Capt. Cummings staaende paa Strand i Qvalbøe Suderøe. Sysselmand Ole Evensen paa Sorenskriverens vegne, og de tvende Kaldsmænd Thomas Hansen og Poul Jacobsen efter forlangende af bemelte Capt. Cummings for at optage en nærmere Besigtelse over bemelte Skib. – De tliligemed Skipperen, Styrmanden og Tømmermanden og 2de af Matroserne samt Hr. Johan Henrich Schrøter som Tolk, gik ombord paa bemt. Skib eller Brig, og ved Eftersyn fandt at den var i meget slet tilstand: Agterstævnen var brækket, Roers-Lykkerne havde givet sig og vare løse – Bielkerne vare alle løse, - Berkholterne fragaaede, og 2de af det dobbelte Dæks Bielker aldeeles brækkede. – De iagttoge at Vandet i Skibet der stoed over 4 Fod i Sanden voxte og stoed af lige Høide i Skibet som paa Udsiderne. – Benevnte mænd erklærede, at efter deres bedste skiønnende og Omdøme, samt paa deres Samvittighed, holdt de bemelte Skib ganske uduelig til at giøres flodt, ( om det og var muelig) og at gaae til Søes igjen. –*

*Skipperen spurgte om de tænkte Skibet kunde staae der, til det, om gjørligt igien kunde blive istand sat. De svarede: at efter al Sandsynlighed og deres Erfaring, da Søen gav en hæftig Brænding ind paa Stranden med østlige og sydøstlige Vinde, saa ville det næste stormende vejr fra den kant brække Overdeelen af Skibet, om ikki aldeeles adsplitte det.*

*Derefter begiærede Skipperen denne Forretning stillet i beroe til imod hans nærmere udlovning for om noget videre da ved Besigtielsen paa Skibet skulle være at foretage.*

*Forbenævnte Mænd indfandt sig da igien den 26de Martij sidst ombord paa før berørte Skib, nu det havde faaet oplosset sin Ladning m. m. og befandt da det da foranførte*

*Beskadigelser i alle maader saaledes beskadiget, og nedboret i Sanden, at det ikke mere her enten kunde i standsættes eller bringes af det Sted hvor det nu staar. – Saaledes ved denne Forretning tilgaaed bekræftes under min Haand og Not: Segl*
*Datum ut Supra*
*L. Olsen*





*Sýnisskjalið hjá Lauritz Olsen, sorinskrivara, av »Sally et Polly«*

### Uppboðssølan

Frá 28. apríl og nakrar dagar fram varð hildin uppboðssøla har lutir av “Sally et Polly” vórðu seldir. Í auktiónsprotokolluni síggja vit t. d. at stóra stagseglið varð selt fyri 13 ríkisdalar og 4 shilling. Fokkuseglið fór fyri 12 ríkisdalar 4 markar og 8 shilling og 2 ankartrossar og toppmastrarendi fyri 23 ríkisdalar, o. s. fr. v.. So lítið var eftir av skrokkinum at rovini fóru fyri bert 10 ríkisdalar, 1 mark og 3 shilling. Minni enn fyri fokkuseglið!

### Søgufalsan

Tað er reinur heilaspuni og søgufalsan tá sagt verður at vrakið varð sleipað til Vágs og umvælt. Har var snøggt sagt einki at sleipa. Heldur var tað so at vrakstubbarnir vórðu fluttir hagar í pettum og brúktir sum tilfar til “Royndina fríðu”. Sjálv legði “Polly et Sally” beinini á sandinum í Hvalba.

**Tøkk**
til Landsskjalasavnið fyri hjálp at leita fram skjøl og til Annu Sofíu í Vági fyri hjálp at lesa.